# Viðskiftatreytir fyri tænastur hjá P/f Televarpið

## § 1 Allýsingar

| | |
|---|---|
| Partarnir: | Haldarin og P/f Televarpið (hereftir nevnt Televarpið) |
| Tænasta: | Vøra, ið Televarpið til eina og hvørja tíð bjóðar sínum haldarum. Talan kann verða um ein grundpakka við kodaðum sjónvarps- og/ella útvarpsrásum ella um ein grundpakka saman við ymiskum eykapakkum. Talan kann eisini verða um aðrar serligar tænastur. |
| Móttakari: | Digitalur móttakari (set-top boks) við innbygdum dekodara |
| Haldarakort: | Eyðmekt kort, ið haldarin leigar frá Televarpinum at seta í móttakara til tess at kunna síggja tænastuna. |
| Hyggjaraadressa: | Ein postadressa hjá haldaranum í Føroyum, har Televarpið kann senda møgulig skriv til. |
| Pay per view: | Tænasta har t.d. bert verður goldið fyri eina ávísa sending. |

## § 2 Haldið

Hesar viðskiftatreytir eru partur av sáttmálanum millum haldaran og Televarpið og eru galdandi fyri hald av tænastu, sum Televarpið veitir sínum haldarum. Haldið gevur haldara rætt til, við nýtslu av einum leigaðum haldarakorti, at taka ímóti kodaðum sjónvarps- og/ ella útvarpsrásum o.ø., sum Televarpið fyrisitur.

Skrivligur sáttmáli um hald verður gjørdur millum haldaran og Televarpið. Hvør myndigur persónur kann stovna hald, um hann ikki er í eftirstøðu til Televarpið. Sáttmálin fær gildi við undirskrivt av sáttmálanum. Sáttmálin stendur við, til annar parturin slítir sáttmálan.

Hesar viðskiftatreytir eru bert galdandi fyri privatar persónar. Umframt hesar viðskiftatreytir kunnu *sertreytir* ásetast fyri einstakar serligar tænastur (t.d. pay per view). Aðrar viðskiftatreytir enn hesar eru galdandi fyri løgfrøðiligar persónar, eitt nú stovnar og vinnurekandi feløg. Hesar viðskiftatreytir forða ikki fyri, at Televarpið og størri eindir av privatum persónum kunnu gera avtalu um serligar viðskiftatreytir.

Haldarin má ikki nýta tænastuna til almenna framførslu við ella uttan vinningi fyri eyga ella á støðum, har almenningur kemur saman. Haldarin má heldur ikki selja tænastuna víðari.

Televarpið tilskilar sær rætt til at seta eitt hámark fyri, hvussu nógvum haldum, ein persónur kann standa fyri.

Tænastur frá Televarpinum verða bílagdar á oyðublaði, ið fæst frá Televarpinum ella á góðkendum sølustaði. Oyðublaðið og viðskiftatreytirnar eru tilsamans sáttmálin millum partarnar. Haldarin váttar samstundis, at hann ikki er í eftirstøðu til Televarpið. Televarpið tilskilar sær rætt til ikki at stovna hald, um hann, sum bíleggur, er í eftirstøðu til Televarpið. Televarpið kann krevja, at upplýsingar verða skjalprógvaðar. Tá oyðublaðið verður undirskrivað, undirskrivar haldarin samstundis sjálvvirkandi gjaldsflyting hjá peningastovni.

## § 3 Fyrivarni

Televarpið kann nær sum helst broyta skapið á skýggjamyndini, samansetingina av rásum og ráspakkum og raðfylgjuna av einstøku rásunum. Í tann mun, at tað ber til, boðar Televarpið við tveimum mánaða ávaring haldarunum frá størri broytingum í ráspakkum.
Televarpið hevur rætt til í styttri tíðarskeið at senda rásir, ið eru umfataðar av sáttmálanum, ókodaðar, so at tær í hesum tíðarskeiði eisini kunnu síggjast av øðrum enn haldarum. Hetta gevur ikki haldarum mishaldsrættindi.

Útbreiðsluøkið fyri tænastuni hjá Televarpinum kann ikki lýsast heilt neyvt, og Televarpið kann tí ikki veita trygd fyri, júst hvar tað ber til at taka móti tænastuni.
Tað áliggur haldaranum fyri egna rokning og ábyrgd at hava neyðugar tøkniligar innleggingar. Hetta er eisini galdandi fyri móttakara og antennuviðurskifti. Ein fortreyt fyri at kunna síggja tænastuna, er, at haldarin býr í einum útbreiðsluøki fyri tænastuni hjá Televarpinum, at allar neyðugar tøkniligar innleggingar eru gjørdar, og at haldarin nýtir móttakara av slagi, ið Televarpið hevur mælt til.
Møguligar útreiðslur til montørhjálp eru ikki partur av haldinum.
Um kodningstøknin verður broytt, hevur haldarin sjálvur skyldu til at syrgja fyri nýggjum tøkniligum innleggingum, sum møguliga gerast neyðugar.

Í tann mun, føroysk lóggáva ikki forðar fyri tí, kann Televarpið sjálvt nýta og/ella víðarihanda skrásettar upplýsingar um haldaran til rásveitarar o.o. til nýtslu til marknaðarføring av sjónvarpssendingum og tílíkum tænastum.

Neyðugar dagføringar av ritbúnaði (software) í móttakara hjá haldarunum kunnu koma fyri. Televarpið ger hesar dagføringar loftvegis. Haldarin má tá sjálvur taka stig til, at fáa dagføringarnar at virka í móttakara eftir brúksvegleiðingini til móttakaran.

## § 4 Innihald í rásum og sendingum

Televarpið tekur sum útbreiðslufelag onga ábyrgd fyri innihaldinum í tænastuni. Um rásir senda sendingar, ið eru ólógligar sambært føroyskari lóggávu ella myndugleikaavgerð, tilskilar Telvarpið sær tó rætt til at sløkkja fyri eini ella fleiri rásum ella pørtum av teimum í styttri ella longri tíðarskeið.

## § 5 Haldarakortið

Allir haldarar fáa útflýggja eitt haldarakort til leigu. Haldarakortið er ogn hjá Televarpinum. Haldarin hevur tí skyldu til at fara væl um haldarakortið. Slítur annar parturin sáttmálan, skal haldarin beinanvegin lata haldarakortið inn aftur til Televarpið.

Um haldarakort ikki verður latið inn aftur til Televarpið, tá haldið er slitið av øðrum partinum, verður tað rokna sum stuldur frá Televarpinum. Haldarin verður kravdur eftir endurgjaldsupphædd fyri haldarakortið, svarandi til tapið hjá Televarpinum, sum stendst av mista haldarakortinum.

Er hald slitið, og persónur ynskir at stovna nýtt hald, tilskilar Televarpið sær rætt til ikki at stovna nýtt hald, fyrr enn fyrra haldarakortið er latið inn aftur til Televarpið, ella fyrr enn persónurin hevur rindað endurgjald, um fyrra haldarakortið ikki er latið inn aftur.

Um haldarakort verður burtur ella ferst, fæst nýtt haldarakort við at venda sær til Televarpið ella góðkent sølustað. Haldarin skal tó fyrst rinda eitt endurgjald til Televarpið svarandi til tapið hjá Televarpinum, sum stendst av mista haldarakortinum.

Verður haldarakortið stolið frá haldaranum, skal haldarin beinanvegin melda stuldurin til løgregluna og boða Televarpinum frá stuldrinum. Avrit av løgreglufráboðanini skal sendast til Televarpið, so haldarakortið kann verða gjørt óvirkið.

Fyri at móttaka signalið frá Televarpinum á lógligan hátt, er neyðugt at leiga eitt kort, sum er góðkent av Televarpinum. Tað er ikki loyvt at kopiera kortið ella upplýsingar av kortinum.

## § 6 Prísir og gjaldstreytir

Fyri ávikavist at vera knýttur at Televarpinum og fyri tænastuna rindar haldarin eitt:

- Hálvárligt kortleigugjald fyri haldarakortið. Kortleigugjaldið verður rindað fyri eitt hálvt ár fram tann 1. í mánaðinum eftir, at haldið er bílagt, og síðani tann 1. í mánaðinum 6. hvønn mánaða.
- Mánaðargjald, ið verður rindað ein mánaða fram hvønn 1. dag í einum mánaði, fyrstu ferð fyrsta mánaðarskiftið eftir, at haldið er teknað. Mánaðargjaldið veldst um, hvørjum ráspakka haldarin hevur sett seg fyri.

Goldnar upphæddir til Televarpið verða ikki afturgoldnar til haldaran, uttan so at ein upphædd er goldin av misgávum, sum bert Televarpið kann ábyrgdast fyri.

Allir haldarar skulu verða meldaðir til sjálvvirkandi gjaldsskipan hjá peningastovni. Televarpið tekur ikki ímóti inngjaldingum á annan hátt.
Haldarin hevur sjálvur ábyrgdina av, at tøkur peningur er á egnari gjaldskontu, tá gjaldsdagur er. Um haldarin ikki rindar fyri seg, kann Televarpið uttan ávaring frá 5. degi eftir gjaldkomudag steingja fyri móttøku av tænastuni hjá einstaka haldaranum og annars gera mishaldsrættindini galdandi, jvb. § 10. Um haldarin er komin í eftirstøðu, tilskilar Televarpið sær rætt til at krevja eitt eyka gjald fyri at lata tænastuna upp aftur. Hetta gjald kann verða lagt oman á fyrst komandi mánaðargjaldið.
Televarpið tilskilar sær rætt til at krevja eitt eyka gjald fyri broytingar í haldinum.

Rindar haldarin ov seint, hevur Televarpið rætt til at krevja dragurentu eftir rentulógini frá gjaldkomudegnum, til goldið verður, og at krevja áminningargjald fyri hvørja áminning, ið verður send fyri ov seint goldna tænastu.

Sendir Televarpið haldarunum Sjónvarp Føroya og/ella Útvarp Føroya, verður hetta gjørt uttan serstakt gjald fyri hesar rásir. Eitt hald frá Televarpinum frítekur ikki haldaran fyri umframt gjøld til Televarpið at rinda møgulig lógarfest hyggjara- og/ella lurtaragjøld til føroysk kringvørp, herundir til Kringvarp Føroya og/ella Útvarp Føroya.

Upplýsingar um teir til eina og hvørja tíð galdandi listaprísir fyri tænastuna, ásettir av Televarpinum, fáast við at venda sær til haldaratænastuna, tlf. 340340. Prísirnir eru eisini at finna á heimasíðuni www.televarp.fo.

**§ 7 Stovning av trygd**
Televarpið hevur rætt til at krevja neyðuga trygd stovnaða, annaðhvørt við bíleggingina ella seinni, kann vandi vera fyri, at haldarin fer at mishalda gjaldsskyldur sínar.
Trygdin verður stovnað annaðhvørt sum inngjalding av depositum ella við javngóðari bankatrygd frá føroyskum peningastovni, sum Televarpið kann góðkenna. Haldarin rindar allan kostnað av at stovna trygdina.
*Dømi um nær trygd kann krevjast:*
1. Haldari hevur mishildið gjaldstreytirnar.
2. Haldari ynskir at stovna hald í føri, tá haldið hjá øðrum er slitið orsakað av mishaldi, og har haldarin var partur av húskinum hjá viðkomandi, meðan eftirstøðan kom í, og framhaldandi er partur av húskinum.
3. Haldari hevur ikki fastan bústað í Føroyum.

Støddin á trygdini kann ásetast til upphædd svarandi til tað, sum Televarpið metir seg at fara at skuldskriva haldaran fyri í 6 mánaðir, tó í minsta lagi kr. 1.500.

Goldin trygd verður rindað til haldaran, tá hann letur haldarakortið inn aftur. Televarpið tilskilar sær rætt til at mótrokna møguliga eftirstøðu í trygdini.

**§ 8 Skyldur haldarans**
Tað áliggur haldaranum:
- at geva rættar upplýsingar til Televarpið í sambandi við stovning ella broyting av haldi.
- at gjalda fyri tær tænastur, sum Televarpið veitir í samsvari við gjaldstreytirnar.
- at rinda mánaðargjald og kortleigugjald av egnari kontu umvegis sjálvvirkandi gjaldsskipan hjá peningastovni. Um sjálvvirkandi gjaldskipan ikki er stovnað ella góðtikin, verður inngjaldingarkort sent haldaranum fyri fyrstu gjøldini.
- at hava eina hyggjaraadressu í Føroyum.
- skrivliga at siga Televarpinum frá, um hann flytir bústað, ella onnur viðurskifti verða broytt, ið kunnu hava týdning fyri sáttmálan millum haldaran og Televarpið.
- bert at nýta leigaða haldarakortið og ritbúnaðin (software) á leigaða haldarakortinum til tess endamál. Haldarin má ikki broyta ella umseta ritbúnaðin (software) undir nøkrum umstøðum.
- ikki at seta haldarakortið til móttakara aðrastaðni enn á tí adressu, sum stendur á sáttmálanum, ella á tí adressu, sum haldarin er fluttur til, eftir at haldarin hevur boðað Televarpinum frá adressuflyting.

**§ 9 Avhending og flyting**
<u>Televarpið loyvir ikki, at haldari avhendar haldið til annan persón.</u>

Haldari kann biðja Televarpið flyta haldið til annan bústað í Føroyum. Televarpið kann krevja eykagjald í sambandi við flytingina.

**§ 10 Mishald og rættarvirknaður**
Um Televarpið munandi misheldur sínar skyldur, kann haldarin slíta sáttmálan uttan ávaring við skrivligari fráboðan.

Við ólag kann haldarin bert krevja avsláttur fyri ein lutfalsligan part av mánaðargjaldinum og kortleigugjaldinum fyri tað tíðina, tænastan hevur verið slitin ella munandi órógvað. Haldari kann bert krevja avsláttur, um ólagið hevur vart í minsta lagi 7 samdøgur.

**Steinging:**
Um haldarin munandi misheldur sínar skyldur, kann Televarpið uttan ávaring steingja tænastuna. Tað merkir, at tænastan ikki sæst longur. Sum dømi um munandi mishald hjá haldaranum, kann nevnast at haldarin:
- ikki rindar fyri tænastuna í seinasta lagi 5. dagin eftir gjaldsfreistina. Haldarin fær ongan rykkjara, áðrenn tænastan verður stongd
- vannrøkir haldarakortið, ið er ogn hjá Televarpinum
- nýtir haldarakortið ella ritbúnaðin á haldarakortinum til endamál, ið ikki er loyvt sambært hesum viðskiftatreytum
- selir ella roynir at selja haldarakort
- misheldur skyldir, ið eru honum álagdar sambært § 8.

Um Televarpið hevur stongt eitt hald vegna munandi mishald, letur Televarpið stongda sambandið uppaftur skjótast tilber, eftir at haldarin hevur rættað fyri seg, herundir goldið falna skuld. Í hesum sambandi hevur Televarpið rætt til at krevja eitt eykagjald.
Um haldarin misheldur sínar skyldur, kann Televarpið krevja endurgjald fyri eitthvørt tap, herundir eisini endurgjald fyri mistar inntøkur.

**Slit:**
Televarpið tilskilar sær rætt til at slíta sáttmálan 10 dagar eftir, at tænastan er stongd vegna munandi mishald. Hetta merkir, at sáttmálin ikki longur er galdandi millum partarnar. Verður sáttmálin slitin, skal haldarakortið beinanvegin latast Televarpinum aftur. Slítir Televarpið sáttmálan, fær haldarin eina skrivliga kunning um hetta.

Í teimum førum, har Televarpið hevur stongt tænastuna, av tí at haldarin ikki hevur rindað gjaldkomna skuld, verður haldarin skuldskrivaður fyri øll gjaldkomin gjøld, til annar parturin slítir sáttmálan. Tó vil Televarpið í hesum førum slíta sáttmálan í seinasta lagi eftir tveir mánaðir eftir leypandi mánaða. Eftir at sáttmálin er slitin, kann møgulig eftirstøða verða send til innheintingar.

**§ 11 Force Majeure**
Televarpið er leyst av skyldum sínum, um tænastan er slitin ella órógvað orsakað av viðurskiftum, sum Televarpið ikki hevði nakra ávirkan á, herundir - men ikki avmarkað til - toruslættur, ódnarveður, vatnflóð, eldsbruna, kríggj, verkfall og verkbann, herundir eisini verkfall og verkbann, ið raka starvfólkini hjá Televarpinum.

Báðir partar kunnu uttan ávaring siga haldið upp, um Televarpið vegna force majeure ella av aðrari orsøk ikki hevur sent tænastuna í meiri enn 28 fylgjandi dagar.

**§ 12 Uppsøgn og broytingar**
Báðir partar kunnu siga sáttmálan upp til næsta mánaðarskifti í seinasta lagi tann 14. í einum mánaði, uttan so at serlig avtala er gjørd um aðra uppsagnarfreist. Sigur haldari upp sáttmálan eftir uppsagnarfreistina, rindar hann eisini fyri tænastuna, ið fellir til gjaldingar tann 1. í komandi mánaði.

Haldarin sigur sáttmálan upp við at lata haldarakortið inn til Televarpið ella til góðkent sølustað. Tá haldarakortið verður latið inn, fær haldarin eina kvittan fyri móttøku av haldarakortinum.

Eitt hald kann ikki leggjast í dvala í eitt tíðarskeið, soleiðis at haldarin ikki rindar fyri haldið.

Televarpið hevur rætt til at gera broytingar í viðskiftatreytunum og at fremja príslækkingar uttan fráboðan til haldaran, um broytingin burturav er til frama fyri haldaran. Aðrar broytingar í viðskiftatreytunum hevur Televarpið rætt til at fremja við 30 daga ávaring.

Fráboðan um príshækking verður kunngjørd haldaranum beinleiðis ella í føroysku fjølmiðlunum. Televarpið tilskilar sær rætt at hækka mánaðargjaldið og kortleigugjaldið við eini freist, sum er leypandi mánaði + ein mánaði.

Haldarin hevur skyldu til at boða Televarpinum frá bústaðarbroytingum og øðrum viðkomandi broytingum. Fráboðanir, herundir fráboðanir um slit av sáttmálanum millum partarnar, kunnu sendast haldaranum ella setast fram á seinasta kunnuga bústaði hansara (hyggjaraadressuni), hóast bústaðarbroyting hevur verið, uttan so at Televarpið hevur fingið fráboðan um broytingina.

Ynskir haldarin at broyta haldið, so at tað fevnir um aðrar ráspakkar, kann haldarin munnliga ella skrivliga biðja um broytingina. Umbøn um broyting av haldi, verður sett í verk sama dag. Televarpið sendir síðani eina ordraváttan til haldaran við kunning um broytingina. Um haldarin ikki mótmælir innan 14 dagar, stendur broytingin við. Nýggjur sáttmáli ella nýggj sjálvvirkandi gjaldsflyting skal ikki undirskrivast í hesum sambandi. Gjald fyri broyting av haldið, ið er skrásett innan 15. í einum mánaði, verður broytt frá 1. í mánaðinum eftir. Gjald fyri broyting av haldið, ið er skrásett 15. ella seinni í einum mánaði, verður broytt frá 1. í næstkomandi mánaði, tó við gildi frá 1. í mánaðinum eftir broytingina. Er haldið broytt fleiri ferðir í sama mánaði 15. ella seinni í mánaðinum, verður gjaldið ásett eftir síðstu broytingini. Í teimum førum tá haldarin minkar um hald sítt 15. ella seinni í einum mánaði, tekur broytingin (gjald og tænasta) ikki við, fyrr enn tann 1. í næstkomandi mánaða.

**§ 13 Trætumál**
Stingur trætumál seg upp millum partarnar um viðurskifti í sambandi við hald, kann haldarin skrivliga mótmæla til Televarpið. Freistin fyri mótmæli er 3 mánaðir frá tí degi, haldarin varð ella átti at verðið kunnugur við tey viðurskifti, mótmælt verður um.

Avgerðir Televarpsins í slíkum trætumálum kunnu verða kærdar til Fjarskiftiseftirlitið í teimum førum, tá Fjarskiftiseftirlitið hevur heimild at taka avgerðir.

**§ 14 Gildiskoma**
Hetta er 3. útgáva av viðskiftatreytunum hjá Televarpinum. Hesar viðskiftatreytir fáa gildi frá 1. juli 2006.